# tíðinda sosialurin blaðið

7,-

Nr. 225 ★ mikudagur 25. november 1992


## Oljuserfrøðingur:

# Setið hol á nú!



Svenski jarð- og oljuserfrøðingurin Stefan Hultberg

– Stór oljufeløg bara bíða eftir, at landsstýrið skal seta skjøtil á og greitt boða frá, hvat tað ætlar í oljuspurninginum, sigur svenski jarð- og oljuserfrøðingurin Stefan Hultberg í samrøðu inni í blaðnum. – Loyvið sum skjótast útlendskum fyritøkum at gera seismiskar kanningar, og latið tær sjálvar gjalda tær. Ráðiligt er við nýggjari boring í Lopra eisini, men hana mugu tit sjálvir gjalda



# Framtíðin er á botni

Lesið á síðu 3




greitt, hvat vit vilja.Føroyingar mugu til at definera eina greiða strategi, hvussu spurningurin um møguliga olja og gass í hesum økinum skal viðgerast.

-Eg havi samband við fleiri stór oljufeløg, sum fegin vilja sleppa í gongd í Føroyum, men tey bíða eftir útspæli frá føroysku myndugleikunum. Fyrr enn hetta útspæl kemur fer eingin at gera fløgur her í økinum.

Stefan Hultberg heldur, at tað hevði verið skilagott, um landsstýrið nú beinanvegin setti út í kortið ein politik á økinum, soleiðis at útlendsku oljufeløgini fingu greitt at vita, hvat føroyingar vilja og ætla.

-Við hesum sigi eg ikki, at tit skulu kasta tykkum fyri føturnar á útlendsku oljufeløgunum. Tvørturímóti eiga tit at byggja upp eina umsiting á hesum øki, sum ger tykkum førar fyri at taka tær røttu avgerðirnar. Hetta er tað mest umráðandi, men eg haldi, at tað hevur týdning at tit nú "vísa andlit" og siga, hvat tit vilja. Við hesum sipar hann so eisini til eitt uppbýti av økinum í sokallaðar blokkar, har ymisk oljufeløg fáa lisens at arbeiða.

## Fara í gongd skjótt

Stefan Hultberg heldur, at tað nýtist ikki tað stóra forarbeiði, nú áðrenn loyvi verður latin einum ella tveimum útlendskum feløgum at gera miðvísar seismiskar kanningar, sum er tað fyrsta, ið má gerast.

-Hetta kundu tit klárað innan fyri nakrar fáar mánaðir heldur hann. Og hvat viðvíkur slíkum kanningum, so er hetta nakað, sum feløgini sjálvi gjalda. Hetta fer tí ikki at kosta føroyska samfelagnum nakað. Hann heldur ikki, at slíkar avtalar koma at skaða nakað fyri føroyingar, tí tað eru ikki bindandi fyri víðari kanningarnar eitt nú at bora eftir olju.

Tvørturímóti er her møguleiki fyri, at nakað av arbeiði verður í Føroyum og at hetta fer at seta ymiskt virksemi í gongd, sum kann gagna føroyska búskapinum so ella so.

Tá hesar seismisku kanningarnar eru lidnar, um eitt ella tvey ár, so kunnu tey stóru oljufeløgini sleppa framat og tá fara so aftur at ganga fleiri ár, til ein við vissu kann siga nakað um, antin ein oljuvinna við Føroyar verður ein lønandi vinna ella ikki.

## Hetlandsrennan rmest áhugaverd

Sum støðan er í løtuni, so er tað serstakliga økið báðumegin miðlinjuna, tvs. økið báðumegin Føroyar-Hetlandsrennuna, sum er tað mest áhugaverda. Tað er í hesum økinum, at fleiri altjóða oljufeløg hava rakt við olju eitt nú amerikanska felagið "Amereda Hess" og bretska "BP". Hesi hava funnið olju heilt nær tí føroyska markinum.

Stefan Hultberg sigur, at skulu føroyingar gera sær vónir um at finna olju, so er tað í hesum økinum, at vit eiga at leita. Her eru basaltfláirnar ikki so tjúkkar. Og her vita vit longu, at oljuberandi løg eru bretsku megin. So ein kann ímynda sær, at tey halda fram føroysku megin. Men enn eru hetta bara gitingar .

Samanumtikið er talan sostatt um tvey sløg av kanningum. Eitt er at gera eina nýggja Lopraboring fyri at vita, hvat er undir kilometra tjúkku basaltfláunum, hitt er at fara undir fyrst seismiskar kanningar og seinni boring føroysku megin miðlinjuna millum Føroyar og Hetland.

Stefan Hultberg sigur at enda, at tað er av stórum týdningi, skulu oljufeløgini vísa økinum áhuga, at føroyingar og bretar gera av, nær samráðingarnar um markið ætlandi skulu vera lidnar. Hetta er nakað, sum oljufeløgini leggja stóran dent á. Tey fara neyvan út í stórar fløgur og samstarv við føroyskar myndugleikar, uttan at hesin spurningurin meira ella minni er avgreiddur.

## Ráðgeva landsstýri

Nú um dagarnar varð Stefan Hultberg úti í Tinganesi og fundaðist við løgmann. Har gav hann løgmanni góð ráð eitt nú at seta skjótt á nú, áðrenn oljufeløgini heilt missa tolið og fara at venda eyguni móti heilt øðrum møguligum oljuøkjum.

Við lágu prísunum á olju er tað eisini avmarkað, hvussu stórar fløgur oljufeløgini vilja gera, og er ov nógv óvissa knýtt at Føroyaøkinum, so fara oljufeløgini heldur at vísa økjum sum Eysturevropa ans. Hetta er longu støðan, men tann sannroynd, at fleiri stór oljufeløg júst í hesi løtu leita og hava funnið olju og gass so nær føroyska markinum ger, at hetta økið enn hevur ávísan áhuga. Við yvirtøkuni av undirgrundini er tað nú landsstýrið einsamalt, sum eigur útspælið sigur Stefan Hultberg.

jan



*Frá fyrilestrinum í Nóatúni. Martin Heinesen og Stefan Hultberg greiða frá. Orðstýrari er Arne Nørrevang. Mynd jan*

HØVUÐSVINNINGUR:
**Olympus µ (mju:)-1 fototól**




Tann lítla kempan (63x117 mm), sum kann alt – eisini taka myndir/A4 stødd so nær sum 35 cm, frá

**SMS FOTO & VIDEO**
Tlf. 19820 · Postsmoga 1058 · FR-110 Tórshavn

HØVUÐSVINNINGUR:
**Piano 1. elektronisk skrivimaskina**



v/ øllum hugsandi snildum

frá

Partafelagið
**Petersen & Guttesen**
Støðgøta 11 Box 1078 FR-110
Tlf 11115/15999 Telefax 17115

**PowerWay D4**
**15w - 40**
**Framúr premium motorolja til dieselmotorar, -eisini turboløddar**




**Serment dygd til turbo diesel og aðrar dieselmotorar.**
Ein universel motorolja, ið lýkur øll krøv frá dieselmotorframleiðarum og meira afturat.
Sera væl egnað til allar dieselmotorar, nýggjar sum gamlar, -og so minkar tú um brennievnisnýtsluna

Spesifikatiónir:
SAE 15W-40 — API Service: CE-SF
CCMC PD2, D4 og G4 — MIL-L-2104D, MIL-L-46152B
VW 505 00

Fæst í 1, 4 og 10 litra dunkum
Eisini eru 55 og 205 litra trumlur á goymslu

STATOIL
*Vit hava orku til alt*